# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Álopið á sendistovuna var ein ávaring til tað vantrúgvandi Danmark og tey, ið standa við tess lið (Al-Qaeda)*

# Gevst í morgin

**Í morgin fer Hillary Clinton at boða frá, at hon gevst við valstríðnum, og at hon fer at styðja Barrack Obama. Men ikki treytaleyst**

Hillary Clinton heldur, at tann tepri sigurin hjá Barrack Obama er ikki rættvísur. Sjálv fekk hon næstan 18 milliónir atkvøður, sum er meiri, enn Obama fekk, men hon hevur kortini einki val. Tí fer hon nú at boða frá, at hon gevst við valstríðnum.

Men hon vil ikki, at hennara mongu atkvøður skulu fara til spillis. Hennara veljarar skulu fáa okkurt burturúr, at teir atkvøddu fyri henni. Tað er einki at ivast í, at hon fer at kunngera sín stuðul til Barrack Obama sum forsetavalevni, men spurningurin er, hvat hon fer at krevja aftur fyri stuðulin, skrivar AP. Hon kann halda fram í Senatinum, har hon umboðar New York, men tað kann eisini hugsast, at hon fer at stilla upp sum guvernørur har. Ein annar møguleiki er, at hon fær sæti í amerikanska Hægstarætti, tí hon er kend sum ein sera dugnaligur løgfrøðingur. Tað kann eisini hugsast, at hon fær tilboð um at gerast heilsumálaráðharri í einari Obama-stjórn, og so er spurningurin um hana sum varaforsetavalevni hjá Obama. Sjálv hevur hon nevnt tann møguleikan.

Politiskir eygleiðarar í USA eru á einum máli um, at Hillary Clinton fer ikki at gevast við valstríðnum treytaleyst. Hon hevur framvegis ræðið á valmonnunum, sum hon hevur tryggjað sær, og tí kann hon framvegis arbeiðs innanfloks fyri sínum politikki.



*Verður Hillary Clinton varaforseti, ráðharri, hægstarættardómari ella guvernørur?*
*Mynd: Polfoto*

# Kanska ikki fyri rættin fyrr enn um tvey ár

**Sálarstøðan hjá Elisabeth Fritzl og børnum hennara ger, at tað kunnu ganga tvey ár, áðrenn málið ímóti pápa teirra kemur fyri rættin**



*Josef Fritzl skal ætlandi bíða leingi eftir rættarmálinum ímóti sær*
*Mynd: Polfoto*

Eysturríkska løgreglan fer væntandi at ákæra Josef Fritzl fyri morð, tí hann fór ikki til læknan við sinum sjúkum, nýføddum barni, sum doyði nakrar dagar seinni. Hann verður væntandi eisini ákærdur fyri at hava stongt dóttir sína inni og fyri at hava fingið sjey børn við henni.

Men málið er sera umfatandi og torgreitt. Blaðið Österreich skrivar, at enn hevur løgreglan ikki avhoyrt Elisabeth Fritzl, mammu hennara og børnini, tí tey eru so illa fyri sálarliga, at tað verður ikki hildið ráðiligt at avhoyra tey. Franz Polzer, sum er ovasti fyri kriminalløgregluni, sigur við blaðið, at ákæruvaldið fer ikki at leggja trýst á tey, og at málið heldur má bíða.

Tí fara kanningarnar í málinum at taka óvanliga drúgva tíð, og tað kann sambært keldum hjá blaðnum hava við sær, at málið ímóti Josef Fritzl kemur ikki fyri rættin fyrr enn um tvey ár.

Tann 73 ára gamli Josef Fritzl skal í rættin í morgin, tí løgreglan vil hava hann at verða verandi í varðhaldinum.

## STUTT SAGT



*Minst 10.000 fólk eru handtikin í Bangladesh*
*Mynd: AP*

### Fleiri túsund handtikin

Ta seinastu vikuna hevur løgreglan í Bangladesh handtikið minst 10.000 fólk, sum sambært myndugleikunum hava eitt ella annað tilknýti til yvirgang og ymisk brotsverk. Stjórnin hevur lýst landið í undantaksstøðu, og handtøkurnar skulu tryggja viðurskiftini í landinum upp undir tjóðartingsvalið, sum verður seinni í ár, skrivar AP. Tveir av teimum politisku flokkunum kæra seg um, at tað eru serliga teirra limir, sum eru tiknir, men hesum vísir løgreglan aftur. Hon sigur, at tey tiknu hava framt ymisk brotsverk so sum smugling.

### Norðmenn royna semju

Norskir diplomatar hava í loyndum virkað sum millummenn í samráðingum millum umboð fyri kinesisku stjórnina og ta útlagnu stjórnina hjá tibetanum. Blaðið Verdens Gang veit at siga, at tær loyniligu samráðingarnar hava verið í Noregi og aðrastaðni, og frá einari ónevndari keldu hevur blaðið frætt, at í veruleikanum eru tað fleiri ár, síðani norsku semingsroyndirnar byrjaðu. Sambært blaðnum brúka norðmenn somu framferð sum í samráðingunum millum ísraelsmenn og palestinar fyrst í nítiárunum.